# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

19. februar fingu Sigrid Jógvansdóttir og Poul Eiden Müller, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

24. februar fingu Jónvør Andreassen og Friðrik T. Joensen, Norðskála, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

25. februar fekk Jórun Hansen, Velbastaður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4580 gr.

25. februar fingu Ingun og Jákup M. Samson, Viðareiði, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3450 gr.

25. februar fingu Jóna Maria Malunardóttir og Sámal Kyrrugerð á Norðoyri ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4000 g.

26. februar fingu Elin Jacobsen og Sunleif Pattinson, í Funningsfirði, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3600 gr.

26. februar fingu Anja og Eyðbjørn Johansen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

26. februar fingu Elsa Hansen og Jan Andersen, Toftir, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3800 gr.

27. februar fingu Eva og Jón Hammer, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3250 gr.

27. februar fingu Guðrun Árting Rubeksen, Tórshavn og Allan Gulak Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4005 gr.

28. februar fingu Mariann Ejdesgaard og Gestur Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2925 gr.

28. februar fingu Karina og Øssur Nolsøe, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4000 gr.

1. mars fingu Laura Therkildsen og Bogi Dam Jacobsen, Argir, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3950 gr.

1. mars fingu Barbara I. Jakobsen og Jógvan Højgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3050 gr.

## Andlát

23. februar
Polmy Hansen, Skála, 79 ár.

24. februar
Arnleyg Meinhardsdóttir Hansen, Søldarfjørður, 57 ár.

26. februar
Selinda Thomasen, ættað úr Kollafirði, bús. í Keypmannahavn, 58 ár.

27. februar
Sofus Müller, í Porkeri, 91 ár.

28. februar
Maja Lervig, Lerivík, 75 ár.
Hertha Olsen, ættað úr Tjørnuvík, bús. í Hósvík, 63 ár.

# Viljormur Tórsheim 80 ár



Í dag 5. mars fyllir kendi havnarmaðurin og reiðmaðurin Viljormur Tórsheim 80 ár.

Viljormur er sonur Annu og Vilhelm Tórsheim. Mamman var ættað úr Lon í Miðvági meðan pápin var havnarmaður. Pápin var kendur sum góður grótmaður og hevur millum mangt annað lagað stóru brúnna í Havnardali, eisini gjørdi hann fleiri stórarbeiðir í Vági, har undir meginpartin av Vágs kirkju.

Viljormur arbeiddi sum ungur saman við pápanum, men fór seinni undir sjávstøðugt byggivirksemi. Eftir mong ár í byggivinnuni yvirtók Viljormur Sveisingarhandilin eftir Gulak Zachariasen, og rak henda handil inntil hann komin til pensiónsaldur seldi handilin.

Viljormur er ein vitalur persónur »med sine meningers mod«, og hevur mong áhugamál.

Hann hevur frá ungum árum verið aktivur reiðmaður, og fer framvegis onkran ríðingartúrin. Á ungum árum lutók hann og vann fleiri kappríðingar. Hann sat í mong ár sum formaður í Føroya Ríðingarfelag. Hesin áhugi hevur ført til fleiri minnisríkar ríðingartúrin í Íslandi, har hann eisini hevur nógvar góðar vinir.

Havnar Róðrarfelag hevur eisini verið hansara hjartabarn, og hann er framvegis at síggja umborð á eftiransingarbátinum, tá kappróðurin fer fram á Ólavsøku.

Viljormur er samríkishugaður og hevur í mong ár verið aktivur í Sambandsflokkinum. Hann er søgufróður maður, og dugir væl at siga frá. Viljormur eigur døtrurnar Vilbjørg, Maritu og Randi.

## 104 ár

Í dag, 5. mars fyllir Anna Askham í Havn 104 ár. Høvi verður at heilsa upp á hana á Ellisheiminum hendan dagin frá kl. 15.00-17.00

## 70 ár

Í dag, 5. mars fyllir Erling Joensen, Gjógv 70 ár. Dagurin verður hildin hjá Odu og Jørgin, Kálvagerði 5, Tórshavn, frá kl. 19.00.

## Prógv

Anna Mohr Joensen, úr Kollafirði, hevur 11. januar 2005 lokið prógv um løgfrøðingur frá Københavns Universiteti og LLM (Maritime Law) frá Southampton University.

## Brúdleyp

Í dag, kl. 16.00 giftast í Hvannasunds kirkju, Bjørg Lydersen, Norðdepli og Jón Nysted, Hvannasund.

**Dagurin**

**5. mars. Teophilus,** deyður umleið ár 200. Embætismaður í Kesarea. Navnið merkir *hin guðelskandi*

**6. mars. Gotfred.** Óvist er, hvønn sipað verður til. Summir halda ein kardinal í Róm, deyður umleið ár

1100, aðrir ein biskup í Amiens, deyður í 1115. Týskt navn settsaman av orðunum *Guð og friður.*

**7. mars. Perpetua,** deyð ár 202 ella 203. Trælkona í Kartago, sum saman við hábornari konu *Felicitas* varð tikin av døgum fyri trúar sakir.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin